# Tavan í Leirvík legg



**GULLLAKSUR** – Vit ætla at keypa gulllaksin hjá fýra partrolarum í hesi vertíðini, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni í Leirvík

Vilmund Jacobsen

Fleiri skip hava skift eigara í vetur, og millum hesi eru ísfiskatrolararnir, Polarhav og Stjørnan, sum hava verið høvuðsgrundarlagið undir gulllaksinum hjá Tavuni í Leirvík.

Hesi skipini, sum øll árini hava verið heimahoyrandi í Leirvík, eru nú heimahoyrandi í Klaksvík. Líkt er tó ikki til, at hetta fer at ávirka ráfiskagrundarlagið undir Tavuni í gulllaksavertíðini, sum júst er byrjað.

Men tað eru ikki bara Polarhav og Stjørnan, sum hava skift eigara og nú eru heimahoyrandi norðanfyri Leirvíksfjørð.



*- Vit ætla at keypa fiskin hjá fýra av seks gulllaksaskipum í vertíðini hesaferð, sigur Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni*

Tá skipini vórðu seld fyrr í ár, seldi Osmund Justinussen eisini sín part í Tavuni, sum var 25%.

Tað var Norðoya Íløgufelag, sum keypti bæði skipini og partin hjá Osmundi í Tavuni.

Nú eigaraviðurskiftini hjá skipunum vóru broytt, eins og norðoyingar høvdu ognað sær ein fjórðing av partapeninginum í Tavuni, kundi ivi tikið seg upp um, hvussu virksemið í Leirvík nú fer at verða rikið víðari.

Hanus Hansen og JFK Trol hava síni áhugamál í Faroe Pelagic í Kollafirði, sum eisini keypir gulllaks í vertíðini, og tá skipini, sum eru á hesi veiði, bert eru seks í tali, hava fólk sett sær spurningin, hvussu nú verður við gulllaksinum í Leirvík.

Men einki bendir á, at her verður nøkur broyting – í øllum førum ikki, um tað verður, soleiðis sum stjórin í Tavuni, Jóan Magnus Rasmussen, ætlar.

## Ikki minni tilgongd

Jóan Magnus sigur, at Tavan keypti fyrstu lastina av gulllaksi í ár hin 4. apríl. Hetta var fiskur, sum Eysturbúgvin og Vesturbúgvin høvdu fingið.

– Vit fara at miðja eftir at keypa gulllaksin hjá tveimum pørum – ella fýra skipum - í hesi vertíðini.

Stjórin sigur, at felagið fer at leggja seg eftir fiskinum hjá Polarhavi og Stjørnuni – og fiskinum hjá Eysturbúgvanum og Vesturbúgvanum.

Onnur ár hevur tað verið soleiðis, at Tavan serliga hevur keypt fiskin hjá Polarhavi og Stjørnuni – og fiskin hjá Eysturbúgvanum.

Tavan hevur ikki framleiðsluorku til at keypa gulllaksin hjá øllum seks skipunum, sum eru á gulllaksaveiði, tá vertíðin er. Tí hava Vestmenningur og Fram onnur ár verið noyddir at selja ein part av veiðini uttanlands, men síðan Faroe Pelagic í Kollafirði fór undir sítt virksemi við ársenda í 2009, hava skipini í vertíðini lagt flestu lastirnar upp í Kollafirði.

Jóan Magnus Rasmussen, stjóri í Tavuni, sigur, at tey hava ongar broytingar merkt, síðan eigaraviðurskiftini hjá Tavuni, eins og hjá ísfiskatrolarunum, Polarhavi og Stjørnuni, eru broytt.

## Langir dagar

Gulllaksavertíðin varar vanliga frá apríl og til nakað væl út á heystið, og í hesum tíðarskeiði er vanliga nógv virksemi á Tavuni í Leirvík, sum virkar gulllaksin til fars.

Í vertíðini hava eini 60 fólk úr at gera á virkinum, og í hesum tíðarskeiði er vanligt at arbeiða í vaktum, eins og arbeitt verður í vikuskiftinum, tá tað er neyðugt fyri at fáa fiskin undan.

Tavan í Leirvík hevur havt rættiliga góð úrslit seinnu árini og hevur havt avlop á hvørjum ári, síðan felagið fór undir sítt gulllaksavirksemi miðskeiðis í nítiárunum.

Faroe Pelagic í Kollafirði hevur hinvegin heilfryst gulllaksin, eins og gjørt



# Loystu aftu

**Tá partrolararnir, Vestmenningur og Fram, fóru til fiskiskap fríggjakvøldið, vóru teir ikki komnir langan veg, fyrr enn Fram fekk trupulleikar**